

18+

*– Eg gleði meg í september, tá eg sjálv sleppi á legu her, sigur 18 ára gamla Svanna Heradóttir Hammer úr Klaksvík. Í farnu viku var hon ein av mongum leiðarum á Zarepta*

Mynd: Jens Kristian Vang

# EIN

**SUMMARLEGA**
**– Mær hevur altíð dámað sera væl at koma higar á Zarepta, sigur unga klaksvíksdaman, Svanna Heradóttir Hammer. Hon er farin um aldursmarkið fyri summarlegurnar, men kann hinvegin síggja fram til í heyst, tá ein lega verður fyri hennara aldursbólk, nevniliga 18+. – Tað gleði eg meg til, sigur hon.**

Snorri Brend

Klokkan er fimtan minuttir yvir 11 hósdagin. Úr stóra salinum í erva hoyrist góður andaligur sangur, nú børnini eru savnað saman til dagsins næsta bíbliutíma.

Tað eru kortini ikki øll sum eru í salinum hesa løtuna. Í turrveðrinum hesa løtuna eru nøkur ungfólk farin út um at stytta sær stundir eina løtu.

Millum hesi er Svanna Heradóttir Hammer, sum er ein av mongum leiðarum ið krevjast til eina slíka legu.

Eftir morgunmat, andakt, rudding, dagsins fyrsta bíbliutíma og eina fríløtu, fáa leiðararnir eisini sína fríløtu.

– Vit byrja onkran morgun kl. 7 og onkran kl. 8. Og so arbeiða vit eisini onkutíð til kl. 11 um kvøldið, greiðir hon frá. – Men tað er eisini gott at kunna slappa av viðhvørt.

Næst á skránni er døgurðin